## Chelsea ætlar sær Ronaldinho

Enska blaðið, The Mirror, sigur frá eini keldu tætt at Ronaldinho, at hann ætlar at fara frá Barcelona, tí hann manglar neyðuga stuðulin í felagnum. Hetta hevur fanga oyruni hjá eigaranum í Chelsea, russanum Roman Abramovich, og hann skal eftir øllum at døma vera klárur við kekkheftinum. Sum skilst er Abramovich til reiðar at brúka 570 milliónur krónur uppá brasilska bóltsnillingin, sum hevur verið í Barcelona í fýra ár. Eftir øllum at døma kemur Ronaldinho ikki so væl út av tí við hollendska ráðgevan í Barcelona, Johan Cruyff, og tí umhugsar hann nú støðuna í Barcelona.

## Steypakappingar í amboðsfimleiki á Glyvrum

Føroya Fimleikasamband skipar leygardagin kl. 17.30 fyri steypakapping í amboðsfimleiki, sum verður í fimleikahøllini á Glyvrum. Kappingin er fyri kvinnur, menn, kvinnu- og mansunglingar. Kvinnurnar og kvinnuunglingarnir kappast á bitanum, meðan menninir og mansunglingarnir kappast í ringunum. Seinni verða eisini amboðskappingar, har fimleikararnir fáa roynt seg í lopi, í barr og á gólvinum.

Talv:

# Ein øðrvísi starvsvenjing

**Mogens Nielsen, sum lærir skúlabørn í Sandoynni at telva, gleðist um, at ungi telvarin, Herborg Hansen, hevur valgt at koma í starvsvenjing hjá honum, har hon millum annað lærir ung børn at telva**

**TALV**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Mogens Nielsen er dani og arbeiðir fyri Mentamálaráðið, har hann hevur arbeitt í 3 ár. Í 2004 byrjaði Mentamálaráðið at arbeiða við eini verkætlan, sum skuldi bøta um frítíðarmøguleikarnar hjá børnum úti á smærri bygdum, og her kemur Mogens inn í myndina.

Mogens dámar sera væl at telva, so henda frítíðarmøguleika hevur hann valt at geva børnum, sum hann undirvísir. Í løtuni er hann á Sandoynni, har hann lærir børn í fólkaskúlanum at telva. Hann hevur tó ikki bara valt talv, tí honum dámar tað.

- Eg haldi, at nógv børn hava brúk fyri koncentratión. Børn kunnu vera sera ófriðarlig í vanligu tímunum, men koma tey at telva, so eru tey koncentreraði, tí nú mugu tey veruliga hugsa seg um, áðrenn tey flyta næsta leikin. Tá tey telva, mugu tey finna loysnir, og soleiðis byrja tey eisini at hugsa kritiskt.



*aHerborg Hansen hevur verið í starvsvening hjá Mogens Nielsen á Sandoynni, har hon m.a. hevur hjálpt Mogens at lært ungar sandoyingar talvkynstrið.*

*Mynd: Oskar Oskarsson*

**Herborg í starvsvenjing**

Tosa vit um talv, so slepst ikki undan at nevna Hega Dam Ziska, sum er fremsti telvarin í Føroyum. Ein telvari, sum tó ikki verður so nógv nevndur, er Herborg Hansen úr Klaksvík. Hon er 16 ár, og fyri ikki so langari tíð síðani vann hon danska meistaraheitið í talvi, so hon er eisini eitt av heilt stóru talvnøvnunum í Føroyum, sjálvt um øll kanska ikki kennast so væl við hana.

Herborg gongur í 10. flokki, og tá hon skuldi velja, hvar hon skuldi í starvsvenjing, fall valið á Mogens Nielsen. Hon vildi sleppa í starvsvenjing hjá Mogens, tí at hann var ein av fáu talvlærarunum á føroyskum skúlum.

Mogens var sum vera mann sera fegin um avgerðina hjá Herborg.

- Herborg hevur klárað tað ótrúliga væl. Børnini á skúlanum hava dámt væl at hava hana til talvlærara, og tað hevur eisini hjálpt, at tey kennast við navnið Herborg Hansen.

- Eg havi sagt fyri børnunum, at Herborg hevur vunnið danska meistaraheitið í talvi, og hetta ger tey eyka spent.

Mogens leggur afturat, at hann heldur, at hetta heilt víst hevur økt um áhugan millum børnini at telva, og at ein slíkur telvari er komin út á skúlan í starvsvenjing. Hann sigur seg eisini vóna, at onnur fara at gera hetta eftir henni.

Hetta hevur riggað ótrúliga við Herborg her á skúlanum, og eg vóni, at onnur talváhugaði fara at fylgja hennara leið. Um fleiri telvarar fara út á skúlarnar, so fer hetta heilt víst at økja enn meir um áhuganum hjá ungum føroyingum at telva.

## TOPPSKJÚTTAR

**Atlantic Airways deildin:**

| | | |
|---|---|---|
| Finnur Hansson | StÍF | 103 |
| Damir Oros | KÍF | 100 |
| Blagoje Buha | Neistin | 84 |
| Rókur Akralíð | Kyndil | 75 |
| Esbern Patursson | H71 | 72 |
| Hans Áki Dal Christiansen | Kyndil | 70 |
| Sámal Joensen | VÍF | 69 |
| Tróndur Kragesten | Neistin | 65 |
| Daniel Rapa | KÍF | 59 |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 58 |

**Sunset deildin:**

| | | |
|---|---|---|
| Nicoleta Radu Hansen | Neistin | 101 |
| Daiva Tuomaite | VB | 94 |
| Lina Andriulyte | Kyndil | 73 |
| Ninna K. Johansen | StÍF | 57 |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 55 |
| Alina Olaru | Stjørnan | 49 |
| Anja Heinadóttir | Kyndil | 41 |
| Durita Christophersen | Stjørnan | 38 |
| Simona Petersen | Stjørnan | 37 |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 36 |

**SUNSET KAPPINGIN – KVINNUR**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 261 | 209 | 52 | 9 |
| 2 Stjørnan | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 223 | 182 | 41 | 8 |
| 3 VB | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 251 | 247 | 4 | 8 |
| 4 Kyndil | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 235 | 272 | -37 | 2 |
| 5 StÍF | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 199 | 259 | -60 | 2 |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN – MENN**

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 354 | 322 | 32 | 11 |
| 2 StÍF | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 332 | 320 | 12 | 9 |
| 3 KÍF | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 321 | 332 | -11 | 7 |
| 4 Neistin | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 377 | 363 | 14 | 6 |
| 5 Kyndil | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 336 | 332 | 4 | 6 |
| 6 H71 | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 324 | 375 | -51 | 5 |

**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 13 | 10 | - | 3 | 34 | 21 | 13 | 13 |
| 2 TB | 13 | 8 | - | 5 | 28 | 17 | 11 | 10 |
| 3 Dráttur | 12 | 8 | - | 4 | 29 | 22 | 7 | 9 |
| 4 SÍ | 12 | 7 | - | 5 | 26 | 22 | 4 | 8 |
| 5 KÍF | 12 | 2 | - | 10 | 19 | 30 | -11 | 2 |
| 6 Mjølnir | 12 | 2 | - | 10 | 9 | 33 | -24 | 2 |

**Meistaradeild menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 10 | 9 | - | 1 | 27 | 13 | 14 | 11 |
| 2 Mjølnir | 10 | 8 | - | 2 | 27 | 13 | 14 | 10 |
| 3 Fram | 10 | 5 | - | 5 | 19 | 21 | -2 | 6 |
| 4 Fleyr | 11 | 3 | - | 8 | 16 | 26 | -10 | 4 |
| 5 SÍ | 11 | 1 | - | 10 | 16 | 32 | -16 | 1 |